

*Tað eru um 600 útlendskar kvinnur í Føroyum. Tær koma úr so fjarskotnum londum sum Sýria, Marokko, India, Brasilia, Madagaskar og Senegal.*

MYND: MODELMYND

eru gestablíðar, heitar, hjálpsamar og fittar. Eisini hava tær nógv vinfólk í Føroyum.

Kortini er okkurt, sum skemmir:

– Føroyingar eru fittir, men teimum dámar í so væl at slatra. Eg vil ikki ljóða negativ, men fleiri føroyingar taka nakað lætt uppá sítt arbeiði. Men tað er í lagi, tí tað hendir ikki so nógv landinum, so hví skunda sær? skemtar ein av kvinnunum

Ein onnur kvinna leggur afturat:

– Eg veit ikki, um føroyingar eru bangnir fyri at vit stjala teirra arbeiði. Men veitst tú hvat, føroyingar tíma ikki at gera okkara arbeiði. Arbeiðsfólkið á fiskavirkjunum eru útlendingar. Flestu vaskikonurnar eru av Filipsoyggjunum. Hví? Tí føroyingarnir vilja ikki hava tey arbeiðini, slær hon fast.

## Úr øllum heraðshornum

Fleiri og fleiri útlendingar flyta til Føroya. Við ársbyrjan í ár vóru í alt 1180 útlendingar í Føroyum. Hetta svarar til 2,4% av samlaða fólkatalinum. Hetta talið er ikki høgt sammett við okkara grannalond. Áður komu nógv flestu innflytararnir úr Norðanlondum. Henda myndin er broytt, tí størsti parturin kemur úr londum, sum mentanarliga, búskaparliga og málsliga eru øðrvísi enn Føroyar.

Hyggja vit nærri at kynsbýtinum eru í alt um 600 kvinnur, og tær komur úr 64 ymiskum londum. Ímillum okkum eru kvinnur úr so fjarskotnum londum sum Sýria, Marokko, India, Brasilia, Madagaskar og Senegal. Vert er at leggja til merkis at sambært Hagstovuni eru heili 15 kvinnur úr Australia og 31 úr Stórabretlandi.

Tað er neyðugt at hugsa um, at tað er ein stórur munur at flyta til Føroya úr Evropa ella úr Afrika. Undir einum fyrispurningi á Løgtingi í farnu viku, lýsti Bergtóra Høgnadóttir Joensen, tingkvinna, støðuna soleiðis:

Tað er stórur munur, um tú kemur úr eks-Jugoslavia, Kina ella Somalia. Fleiri av hesum útlendingunum eru eisini analfabetar. Set teg í støðuna hjá einum, sum hevur búð í einum klansamfelag í Afrika alt sítt lív. (...) Í Kvinnuhúsinum møta tey nógvum útlendskum kvinnum. Og har skelkar tað, hvussu lítið hesar kvinnur vita um síni rættindi í Føroyum. Eitt nú vistu summar av kvinnunum ikki, at tær kundu halda pinkoduna fyri seg sjálvar.

> Í Danmark ert tú noyddur til at læra málið fyri at fáa eitt arbeiði. Har eru ókeypis skúlar ella fært tú pengar fyri at fara í skúla. Í Noregi eru 200-300 tímar settir av til at læra málið. Í Føroyum er tað 20 tímar. Men tú kanst ikki læra stórvegis upp á 20 tímar. Hygg at børnunum. Tey fara í skúla fyri at læra teirra egna mál fyri at læra at málið ordiliga. Hvat væntar tú av einum útlendingi?

ÚTLENDINGAR Í FØROYUM:

| | 31. des 1983 | 31. des 1988 | 31. des 1993 | 31. des 1998 | 1. jun 2004 | 1. jan 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útlendingar annars | 163 | 270 | 204 | 274 | 698 | 848 |
| Norðurlendingar | 191 | 337 | 207 | 253 | 315 | 332 |
| **Útlendingar í alt** | **354** | **607** | **411** | **527** | **1.013** | **1.180** |
| Fólkatal í alt | 44.701 | 47.638 | 45.349 | 44.806 | 48.407 | 48.778 |

## Avbjóðingin

Heldur gongdin fram, at fleiri útlendingar flyta til Føroyar, standa føroyskir myndugleikar við einari stórari avbjóðing. Henda avbjóðing er at skapa samanhald og samljóð millum fólk, sum í størri mun verða sett saman av ymiskum virðum, normum og siðvenjum. Vit skulu við øðrum orðum læra okkum at gagnnýta tær dygdir, sum onnur fólkasløg bera, og geva teimum møguleikan at kenna seg sum føroyingar.

Tað er týdningarmikið, at samfelagið, og kanska serliga politikarar, viðurkenna, at integratión er alneyðug fyri at fáa eitt samfelag, har øll kunnu trívast. Integratión hendir skjótari og betri, tá ið ávísar skipanir rigga. Hetta inniber millum annað, at útlendingar fáa bjóða neyðuga málundirvísing og kunning, bæði um praktisk viðurskifti og um føroyska samfelagið sum heild. At útlendingar ikki fáa neyðugu kunningina ella málundirvísingina er ein trupulleiki, ið ikki verður loystur av sær sjálvum. Onkur má tí vísa trupulleikanum ans, vísir Barbara Jacobsen á.

Hon leggur dent á, at tað er umráðandi at hava í huga, at hennara kanning byggir á samrøður við kvinnur, ið eru giftar við føroyskum monnum. Við øðrum orðum koma tær beinleiðis inn í eina familju – eitt sosialt netverk.

– Hetta ger tað léttari at verða integreraðar, tá netverkið aloftast hjálpir til. Hóast hetta, er tað greitt, at hesar kvinnurnar ikki kenna seg eins vælkomnar av samfelagnum, og at myndugleikarnir áttu at gjørt meir fyri at hjálpa teimum á veg. Hvat so við teimum, sum ikki koma til eina familju? Tey hava einki netverk at byrja við, og hava harvið enn meiri brúk fyri stuðli frá myndugleikunum. Her hugsi eg um eitt slag av »startkapitali«, ikki peningaligan, men sosialan ella mentanarligan kapital, t.d. málskeið og kunning um ymisk praktisk viðurskifti, heldur Barbara Jacobsen.

1. januar 2011 er ætlanin, at Føroyar yvirtaka útlendingaøkið. Fyrireikingarnar at orða ein haldgóðan integratiónspolitik eru farnar av bakkastokki, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í útlendingamálum.

– Tað er alneyðugt, at teir útlendingar, sum koma til Føroya hava tí neyðugu kunningina um føroyskt mál, føroyska mentan, føroyskan politik og føroyska rættartrygd, so tey kunnu kenna seg heima í hesum landi. At kenna føroyska mentan og duga føroyskt mál er also tað mest grundleggjandi í einari veruligari integratión, segði landsstýriskvinnan undir einum fyrispurningi í farnu viku.

Og hetta fellur óivað í góða jørð hjá fleiri útlendingum. Eisini teimum, sum longu búgva í Føroyum. Hennara hægsta ynski er at integrerast í okkara mentan. Hava sítt barn og sína familju her og vil vera partur av føroysku mentanini.

– Uttan at hyggja í spegilin, kenni eg meg føroyska. Eg síggi bara øðrvísi út. Í mínum hjarta og í mínum høvdi eri eg føroyingur. Sama um eg ikki dugi málið, so royni eg. Eg var í Danmark í nakrar vikur, og tá segði eg, »Eg vil heim«, og allar mínar føroysku vinkonurnar flentu, sigur ein av kvinnunum at enda.